

# Oljan skilur teir borgarligu í Norra

**Jan Müller**

10.09.2013 - 17:18

Oljan.fo

flokkarnir, sum vunnu norska stórtingsvalið, skulu til at skipa stjórn.

Her er bæði talan um norska oljugrunnin og um leiðirnar út fyri Lofoten

Erna Solberg og Høgriflokkurin vunnu norska valið saman við hinum borgarligu flokkunum. Men tá hon skal skipa stjórn, skal hon hava allar tríggjar borgarligu flokkarnar við sær. Og longu nú er greitt, at tá tað um oljuframtíðina ræður – og oljan hevur høga raðfesting í norskum politikki - eru stórar andsøgnir og osemjur millum borgarligu flokkarnar.

Stóri stríðsspurningurin í norskum politikki hevur leingi verið ætlanin at leita eftir olju og gassi út fyri Lofoten, Vesterålen og Semja. Ì vinstrastórnini hevur eisini verið ósemja um henda spurning, og nú sleppur so nýggi forsætisráðharrin at taka støðu til sama mál.

Høgra og Framburðs-flokkurin eru fyri leiting í hesum økinum, meðan teir smærri borgarligu flokkarnir, teir Kristiligu og Vinstra, eru ímóti.

Hin oljustríðsspurningurin er, hvussu pengarnir í Oljugrunninum skulu brúkast. Her er Høgra fyri at varðveita verandi skipan, har tað ikki verður sett hol á oljugrunnin meira enn tað hevur verið galdandi higartil, men hetta er Framburðsflokkurin ikki samdur í. Hann vil sleppa at brúka meira pengar úr grunninum til eitt nú samferðslunetið og tey eldru